gult cyan magenta svart

VIÐMERKINGAR

Ríkisfelagskapurin við Danmark er eitt privilegium

Hilmar Simonsen

Eftir at hava búð og lisið uttanlands í nøkur ár, fyrst í DK og síðani í Noreg eri eg komin at kenna nokkso fitt av fólki nógva ymsastaðni frá úr heiminum. Táið eg havi tosa við fólk um lestrarlív o.a., so er meiri enn so hent, at tað onkuntíð er komið inn á politik eisini. Tá ið prátið er komið inn á føroyskt fullveldi, havi eg fest meg við, at fólk úr nógvum ymiskum londum, sum t.d. amerikanarar, svejtsar, russar, og skotar hava ilt við at skilja, hví Føroyar vilja ríva seg leysar úr ríkisfelagsskapinum við Danmark.

Einastu fólkasløg eg havi uppliva hava "forstáilsi" fyri tí føroysku sjálvstýrisstrembanini eru norðmenn og íslendarar. Eg kann ikki lata verða við, at spyrja meg sjálvan, hví júst bert hesir, okkara nærmastu 'stóru' grannar, halda tað verða skilagott, at Føroyar taka sjálvstýri! Hetta kann verða vert at grunda eitt sindur yvir.

Argumentir fyri at slíta seg leysan úr ríkisfelagsskapinum

Fyri at vera heilt erligur, so meini eg ikki, at eg enn havi hoyrt eitt einasta gott argument fyri at vit eiga at taka sjálvstýri. Tað sum hevur verið at hoyrt frá loysingarrørsluni í Føroyum er sovorið nakað sum, at vit í Føroyum koma ikki at taka ábyrgd fyrr enn vit hava tikið fult sjálvstýrið. Hetta haldi eg, av nógvum ymsum orsøkum, vera heilt ótrúligt. Fyri tað fyrsta, so finnast tað myriadur av londum í heiminum, sum hava fullveldi, men sum ikki eru fyrimyndarlig upp á nakran máta; lat okkum harnæst taka aktuella termin "frælsið er ábyrgd" sum tó ivaleyst er rætt, men sum eg meini er fullkomiliga villleiðandi í okkara høpi. Í Føroyum hava vit nettup so nógv frælsi sum er, í øllum føroum frá danskari síðu, at vit reint faktiskt ikki síggja skóðina fyri berum trøðum!

Tað er harmiligt, at vit ikki duga at differentiera ímillum tað at verða ein koloni, og so tað at vera partur av einum ríkisfelagsskapi. Jamen ikki "á jøvnum føti" sigur onkur; tað meini eg eisini er skeivt, men er bert ein spurningur um pengar, og so leingi sum vit eru heft peningarliga at øðrum, so vilja vit verða meira ella minni undirbrotlig yvir fyri teimum, fullkomiliga óansæð um vit hava fullveldið ella ei.

Og einki er meiri mannminkandi enn júst tað, at vilja taka fullveldið upp á rokningina hjá øðrum. Hetta kann fáa meg at skammast við at verða føroyingur.

Gera ríkisfelagsskapin til ein trupuleika

Tað at gera ríkisfelagsskapin til ein trupuleika er eisini ein lívsstílur. Men í mínari verð er tað ógrundað. Vit hava hin vegin eitt hav av møguleikum í ríkisfelagsskapinum, bæði tá tað snýr seg um útbúgvingarmøguleikar, møguleikar fyri at arbeiða uttanlanda, møguleika fyri at kenna okkum sum part av eini størri heild, og møguleikar at ferðast og fjøltátta okkara samleika í einum nógv størri høpi enn vit fara at kunna eftir at hava redusera okkara landafrøðiliga og mentunarliga grundarlag til bert at umfata hesar 1400 km2 á 62∞N. Eg vil tó ikki útiloka, at eg kundi verið loysingarmaður høvdu vit verið í ríkisfelagsskapi við okkurt annað minni sivilisera land, men líka mikið hvussu ein vendur og snarar tingunum, so er ríkisfelagsskapurin við Danmark bert ein trupuleiki um ein vil gera tað til ein trupuleika. Vit eru ikki kúga, danir eru eitt tað mest fyrikomandi, pragmatiska og reella fólkaslag ein kann hugsa sær.

Tjóðskaparynski byggir á eina falska illusión

Nógv halda, at tá ið Føroyar verða fullveldisland, tá fer Føroyar at fáa størri profil úteftir. Tað er t.d. meiri sannlíkt at hildnir verða stórpolitiskir fundir í Føroyum, Føroyar sum sjálvstøðug tjóð upp í ST osfr. Tílíkt sum nógv halda fer at seta Føroyar á heimskorti.

Álvaratos, eg haldi at hetta verða ov grunt. Hví er tað fyri tað fyrsta so týdningarmikið at profilera Føroyar úteftir sum verandi nakað størri enn Føroyar í veruleikanum er. Hvat er hetta fyri ein trongd alt ov nógvir føroyingar hava, at vilja blíva váttaður av øðrum. Eru vit nakað, so vilja onnur heilt avgjørt eisini leggja merki til tað fyrr ella seinni. Hetta óansæð fullveldi ella ei. Einki er meiri irriterandi enn reyphøvd sum í veruleikanum ikki hava nakað at hava tað í, og tað burdu vit roynt at umgingist.

Tað er eisini ein fyrimunur fyri okkum í altjóða høpi bæði at kunna profilera okkum sum føroyingar og/ella danir. Fólk sum koma av Hawaii-oyggjunum hava eisini fyrimunir av, at vera bæði hawaiibúgvar og samstundis amerikanarar. Tað er betri at hava ov nógvar møguleikar enn at hava ov fáar.

Um Føroyar blívur eitt oljuland, so standa vit nógv sterkari í okkara núverandi ríkisrættarligu støðu enn um vit velja at skilja okkum úr flokkinum og valla eina. At tey stóru rovdjórini fylgja gongdini, og liggja framvið at taka kjansin tá hann møguliga býðst er einki at ivast í. Vit fara ongantíð heldur at hava skuggan av møguleika við 47.000 íbúgvum at byggja upp tað ekspertisu sum skal til fyri at reka eitt nýmótans samfelag; ei heldur at byggja

upp tað neyðugu ekspertisu á tí jarðfrøðiliga økinum sum skal til í sambandi við eina møguliga komandi oljuvinnu.

Men ein ríkisfelagsskapur við eitt so væl fyriskipa og framkomi land sum Danmark, og sum vit hava so nógv søgulig bond og felags virðir við, er og verður tað besta at at halda okkum til, nú sannlíkt er, at vit fara inn í eina oljutíð.

Gera okkum leys av stuðuli

Hava vit veruligan stoltleika, so eiga vit at gera okkum so leys sum møguligt av donskum stuðuli. Men um hetta skuldi eydnast, so áttu vit framvegis at verði verandi í ríkisfelagsskapinum, og tá hevði termurin "á jøvnum føti" óiva fingið meiri innihald.

Men í mínari verð hevur ríkisfelagsskapurin nógv fleiri virðir enn bert tað peningaliga. Felagsskapar-kensla og sympati eru elementir sum viga tungt á mínari vágskál í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark.

Vónandi ikki ov seint

Tað er longu nú nógv at rætta upp uppá, fyri at bera í bøturflaka fyri tað grums og grugg sum er íbirt gjøgnum hetta seinasta valskeið. Men vónandi vil ríkisfelagsskapurin kunna varveitast, og takka verið tí yvir 600 ára longu felags søgu vit hava við danir, so er hesin felagsskapur vónandi ikki varandi meintur hóast førda politikk landsstýrisins verandi valskeið. Danir dáma fjøltáttan, og vilja tey soleiðis helst hava Føroyar verandi í ríkinum tí tað eysæð ger ríki okkara meiri fjøltátta bæði mentunarliga, landafrøðiliga, lívfrøðiliga, osfr. Okkara lítla kæra land hevur ei heldur allar hugsandi variatiónir at bjóða upp á, og tí er tað avgjørt eisini ein fyrimunur fyri okkum at verða partur av einum størri ríki. Lat okkum ikki loyva undirlutakenslum framat, men heldur virka fyri varðveitan, menning og rættan upp á skeivleikar av okkara núverandi ríkisrættarligu støðu.

Rás Tórshavn síggjast í Kollafirði

Tíðindaskriv

Í sambandi við at Tórshavnar kommuna og Kollafjarðar kommuna verða lagdar saman, fer Rás-Tórshavn at senda í Kollafirði frá 01.01.2001.

Tó kunnu tey, sum búgva Inni í firði og fram í Dal ikki rokna við at síggja nøktandi.

Rás Tórshavn sendir á UHF-rásum, og skal tí ein UHF-antenna nýtast fyri at kunna síggja Rás-Tórshavn í Kollafirði.

Hanus Vang og Sandvíkir

Simme Arge Jacobsen
vegna ÍSF, Skjótisamband Føroya og Veiðifelagið Byrsumúla

Hanus Vang er aftur farin í hernað fyri at fáa okkum burtur av Sandvíkum. Hóast hetta málið hevur verið jaglað væl og virðiliga bæði í friðingarnevndunum og í øllum relevantum stovnum tey seinastu tíggju árini, og er komið út í hinum endanum við bláum stempli til okkara fyrimun, roynir hann framhaldandi at øsa fólk ímóti okkum.

Tórshavnar Býráð hevur lagt økið út til frítíðar- og ítróttaøki og keypt tað frá Jarðarráðnum til hetta endamálið, og tað er júst tað, sum Hanus Vang í síðsta enda sigur seg vilja fremja: At hetta vakra økið kann verða varðveitt sum frítíðaraøki burturav, og ikki fara fyri skeyti sum t.d. ídnaðarøkið uppi á Hjalla.

Føroyar eru eitt sjáldsama vakurt land, sum vit eiga at fara væl um, kanska betri enn gjørt verður sum er, og mong eru tey plássini, sum í vakurleika kunnu dragast fram um heildina sum natúruperlur, og sum kanska áttu at fingið status sum frítíðarøkir.

Eitt av teimum er Sandvíkir, har er bæði vakurt og veðurgott, og Hanus Vang átti at verið glaður, nú tað verður varðveitt, sum tað er. Men tað er neyvan fyri vakurleikan, at hann vil friða. Hví ikki eisini friða Hvítanes, Hoyvík, Boganes, Strond og hvat veit eg?

Tað sum fær hann at stríðast so hart er, hann fyri alt í verðini vil forða okkum í at vera í Sanvíkum. Og hann fer sum vanligt lættliga um veruleikan í sínum altráðu royndum at fremja hetta málið.

Hann legði ikki stórt í akkurát vakurleikan, áðrenn vit komu har í 87. Tá lá alt økið í órøkti, gásaflokkur helt til har, állur treivst væl í veitunum, og seyður

kundi ikki ganga á mýrilendinum, tí hann fekk orm. Har fleyt við allskins óhumsku frá mongum árum, so tað mest minti um eitt Bukvald. Tað tók okkum eina drúgva viku við trillibøru at rudda økið. Grundin til, at vit av fyrstan tíð sluppu at vera har, var júst tann, at økið kortini ikki kundi brúkast til nakað, tí har var so váttligt.

Nei, Sandvíkir hevði ongan góðan, fyrrenn vit komu har at vera.

Rættin var tað einasta har, sum var í brúki tá, og hon hevur verið brúkt øll árini uttan mein frá okkara síðu, Hon liggur als ikki á tí økinum, talan er um, so hon fer framvegis at fáa frið fyri okkum.

At rættin skal vera frá landnáms tíð, er skotið nakað langt við síðuna av, og at hon enn bert er laðað, er helst tí at eingin hevur lagt í at spekkað hana.

Satt er, at tað er gott hjá seyði at hava atgongd til tara, tá ið smátt er av øðrum góðum. Men ikki man hetta vera so umráðandi hjá vælfóðraðum seyði í dag?

Og so er tað skrønan um betongið! Betong má ikki verða brúkt til skjótibreytir, hetta sigur seg næstan sjálvt. Í heila tikið er skjóting ein ítróttur, hvar nat-úran sum minst verður órgvað. Víst verður eisini til úrskurð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Viðvíkjandi útgerðini hjá okkum í Sandvíkum verður víst til loyvir frá Tórshavnar Kommunu.

Hanus Vang er ikki bóndi longur, og ein spyr seg sjálvan, hvønn áhuga hann so man hava í at arbeiða so hart uppá at friða Sandvíkir. Tað er sum nevnt neyvan fyri vakurleikan, han stríðist, tað er heldur persónligt agg ímóti okkum, sum hann enn einaferð ætlar at fáa friðingar-mydugleikarnar at hjálpa sær við at fremja.

Men samanumtikið eru royndir hansara ein tunnligur tekoppur at servera fyri tilkomnum fólki.

VIÐMERKINGAR

Kann ein vinna sær ágóða við at selja annan?

Bjørn Patursson
formaður Bóndafelag Føroya

Tað tykist soleiðis nú vit standa á gáttini til hetta fyrsta árið í eini nýggjari øld. Um ein mánaða kemur nýggj veteriner avtala í gildið ímillum Føroyar og ES. Ein avtala sum bert skuldi snúgva seg um flutning av fiski til ES lond.

Fiskurin skal flóta frítt

Føroyar eru ein fiskivinnutjóð tað er rætt. Tí er tað ikki so løgi, at vit vilja senda fisk á ES marknaðin uttan stórvegis seinkingar um tað slepst undan. Men vit hava hóðast alt aðrar vinnur í Føroyum sum hava líka rætt at verða til.

Meginparturin av føroyingum búgva í meginøkinum, men vit hava hóðast alt 15 aðrar oyggjar har fólk býr sum hevur líka rætt at verða til.

Kann ein loyva sær at seta onnur í vanda fyri at nøra sær?

Tilvildarligt

Eg tók einaferð undir við tankanum, at Landsdjóralæknin (og landslæknin) einsamallir skulu kunna taka endaligar avgerðir á heilsuøkinum, vegna okkum føroyingar. Men tað var út frá tí einfalda sjónarmiði at eg sjálvsagt gangi út frá at hesir "persónar" fyrst og fremst hugsa um at verja okkum og land okkara móti heilsuvanda og álopum uttanífrá. Men har fór eg so dyggiliga skeivur.

Hvørji eru hesir perónar sum umboða okkum føroyingar og samráðast okkara vegna?

Landbúnaðurin fekk at vita at fiskivinnan vildi samráðast um fríðan flutning av fiski til ES-lond. Vit vóru spurdir um tað hevði verið skilagott at tikið landbúnaðin við í hesa veterineravtalu. Vit svaraðu noktandi og vístu á, at vit ikki útflyta so nógv, at tað hevur so stóran skund. Vit skutu upp, at hyggja eftir hvat grannalondini, eitt nú Ísland ferð at gera á økinum.

Úrslitið eftir samráðingarnar er sum kunnugt at ES hevur fingið sníkt inn í sáttmálan:

* At Føroyar taka ímóti livandi djórum og djóraúrdráttum frá ES.londum eftir somu treytum,ið galda fyri handil millum ES-lond.

Hetta merkir í stuttum at eftir fyrsta februar kann ein og hvør innflyta livandi dýr úr ES-landi. T.d. ein Texel ær ella veðr úr Onglandi ella eina geit úr Týskalandi. Eingin steðgur ella sóttverja er loyvd á vegnum. Einasta treyt er at dýrið hevur eina váttan at tað lýkur vanligu krøvini ímillum tvey ES-lond.

Føroyar eru nú limir í ES

Av tí at vit frá fyrsta februar eru limir í ES á vererinera økinum, fer hetta somuleiðis at týða, at onnur lond, sum ikki eru limir í ES, eins og Føroyar, nú eru eru sokallaði 3. lond. Frá hesum londum kunnu vit ikki longur innflyta dýr ella landbúnaðarvørur. Til dømis skal eitt ross sum ein Føroyingur keypur úr Íslandi sendast til Danmarkar í "sóttverju" áðrenn tað kemur til Føroya.

Tak hetta, ella lat verða

Sum vant ganga samráðingarnar har føroyingar eru annar parturin bert ein vegis. Umframt hava vit fingið álagt at seta nýggja dýrasjúkulóg í gildið fyri Føroyar. Undir hesi rammulóg skulu setast í gildið ein hópur av reglum og kunngerðum sum koma at snúgva seg um hvussu vit skulu fyrihalda okkum fyri ikki at framleiða skaðiligan mat.

ES sigur eisini, at av tí at vit ikki kunnu prógva at vit ikki hava sjúkur hava vit líka nógvar sjúkur sum ES-lond! Hinvigin vita øll (ÚF dagliga) at teir lætt kunnu leggja prógv á borðið um at nógv ES-lond hava álvarsligar sjúkur sum vit ongantíð hava sæð í Føroyum. Men tað gevur bert ES ein trumf í hondina. Teir siga, at tá vit um nøkur ár kunnu prógva hvørjar sjúkur vit ikki hava skulu vit sleppa at eksporteraðvørur til ES.

Nú ræður um at snúgva sær undan

Landsdjóralæknin skundar sær at fráskriva sær alla ábyrgd um nú smittandi sjúkur fara at bróta út eftir 1/2. Í tí nýggju dýrasjúkulógini sum skal verða sett í gildið fyri Føroyar áðrenn 1/2 stendur beinleiðis, at dýraeigarin ber allan kostnað av tí sum hendan nýggja lógin áleggur og myndugleikarnir fráskriva sær allan endurgjaldsskyldu um smittandi sjúkur bróta út.

Kann ein vinna ofra aðra fyri egnan vinning?

Hvussu kunnu fólk við ongari ábyrgd ella heimild fyri eini vinnu loyva sær at leggja slíkt til samtyktar fyri okkara fólkavaldu politikarar?

Og ikki minst hvussu kann okkara fólkavaldi landsstýrismaður sum skal umboða okkum øll, lítil og stór, fátak og rík, loyva sær at undirskriva slíka avtalu og harvið taka kvørkratak um eina vinnu hann sjálvur umboðar?

Kann landbúnaðurin samráða seg til betri sømdir við at seta fram uppskot um at handverkarar ella arbeiðsmenn fáa minni í løn?

Tá tað alíkavæl bert er løtuvinningur vit leggja okkum eftir skuldu vit so ikki tikið allan pakkan.

ES brúkar tann vælkenda "elefantteknikkin" fyri at fáa Føroyar uppí ES. Hvat ger man um man skal eta ein fíl og ikki klárar at svølgja hann í einum? Jú tað eru bert eini ráð nevniliga, at skera fílin í smærri bitar og eta ein á gangin. Hesin bitin ES nú hevur etið er heili 95% av fílinum so nú er ikki nógv eftir. Bert tann bleyti parturin sum alíkavæl ikki mettar so væl og væl kann bíða eitt sindur. Gott sum desert!

Nei Høgni! viðhvørt kann man ikki lata verða við at hugsa um hvørjari støðu vit eru í. Sum Heini plagar at siga "hetta er tann kaldi veruleikin" Demokrati er tað so ikki, -ella kanska er demokrati einvegis? í erva frá og niðureftir!

Gleðiligt nýggjár!

Hevði annars ætla at hugleitt eitt sindur um nýggjárásleitið, men tað verður ringt eftir eina slíka nekativt lødda niðurstøðu.

Men alíkavæl vil eg nýta høvi at ynskja øllum eitt gott og ljóst nýggjár.

Tann 2000-12-30
Vinarlig heilsan

Inn við skeið

	Januar	Februar	Mars	April	Mai	Juni
Teldan & Eg	•	•	•	•	•	•
Internet & Eg		•		•		•
Tekstviðgerð & Eg			•		•	
Rokniark & Eg			•		•	
Teldukoyrikort-skeið	•	•	•	•	•	•
Grundskeið í KT (TK)			•		•	•
Grundskeið í stýriforriti (TK)	•		•			
Grundskeið í tekstviðgerð (TK)	•	•	•			
Grundskeið í rokniarki (TK)	•	•	•	•	•	
Grundskeið í datagrunnum (TK)	•		•	•	•	
Grundskeið í framløguforriti (TK)	•	•	•		•	
Grundskeið í samskiftisforritum (TK)	•	•		•	•	
Teldutøk roynd til teldukoyrikort (hvørja viku)	•	•	•	•	•	•
Stóra teldukoyrikortið-skeið	•	•	•	•	•	•
Víðkað skeið í KT (STK)			•		•	
Víðkað skeið í stýriforriti (STK)				•		•
Víðkað samskiftis- og kunningartøkni (STK)			•		•	
Víðkað skeið í tekstviðgerð (STK)		•		•		•
Víðkað skeið í rokniarki (STK)		•		•		•
Víðkað skeið í datagrunnum (STK)		•		•		•
DTP & heimasíðusmíð (STK)						
Heimasíðusmíð við MS FrontPage	•		•		•	
Heimasíðusmíð við Adobe GoLive	•		•		•	
Heimasíðusmíð við Adobe GoLive, framhald			•			
Grafikkur til Web við Adobe Image Ready			•			
PDF til WEB við Adobe Acrobat	•					
Animering við Macromedia Flash			•			
Klárt til Web				•		
Myndaviðgerð við Adobe PhotoShop	•					
PDF til Prent við Adobe Acrobat	•	•				
Skannaraskeið			•			
Prentlutir o.a. við Adobe InDesign				•		
Design við Adobe Illustrator				•		
Klárt til prent					•	
MS Outlook, grundleggjandi		•			•	
MS Outlook, framhaldsskeið			•			•
MS Word - frymlar og flætting			•			•
Projektstýring við MS Project	•			•		
Microsoft Certificering		•			•	
Framløga			•		•	
Snarknøttar í staðin fyri mús	•	•				
KT-trygdarskeið			•		•	
Image Cast		•		•		
E-business		•			•	

(TK) = Teldukoyrikort (STK) = Stóra teldukoyrikortið

Fyrivarni verða tiðk fyri broytingum og prentvillum

Set teg í samband við okkum og fá skránna við dagfestingum

Eitt hitt týdningarmesta tilfeingið hjá vinnulívinum er vælútbúgvið starvsfólk, ið nýta tøku amboðini til fulnar. Hetta krevur ný- og endurútbúgving, ið alsamt er dagferð við tøknina. Skeiðstovan KVASIR er sett á stovn fyri at ganga hesum tørvi á møti. Vit bjóða grund-, framhalds- og serskeið á høgum støði í einum ekskluisivum umhørvi, ið skarar framúr bæði hvat tøkni og komfort viðvíkur. Umframt regluligu skeiðini omanfyri hava vit eitt stórt úrval av serskeiðum, ið verða hildin eftir tørvi. Vit skipa eisini fyri heildarloysnum til virki, stovnar og einstaklingar.

Farodane 12-00

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

KVASIR
Skotarók 14
FO-100 Tórshavn
Tlf. 320204
kvasir@farodane.fo

http://kvasir.farodane.fo

gult cyan magenta svart